SP/F OKKARA

POSTBOX 26
110 TÓRSHAVN
FØROYAR

Argir hin 23. august 2010
Málsnr.: 09/00248-13
Tykkara málsnr.:
Málsviðgeri: Eyð Eidesgaard

# Umhvørvisgóðkenning

# av

# Bryggjarínum hjá sp/f OKKARA

Henda umhvørvisgóðkenning av bryggjarínum hjá sp/f OKKARA, matr. nr. 51b á Velbastað, er givin við heimild í § 29 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd, seinast broytt við løgtingslóg nr. 128 frá 22. desember 2008, og § 1, nr. 4 í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Umhvørvisstovuna, sum broytt við kunngerð nr. 90 frá 28. september 2007.

## 1 Endamál

Endamálið við umhvørvisgóðkenningini er at fyribyrgja og avmarka dálking av náttúru og umhvørvi og ampum, sum kunnu standast av virkseminum.

## 2 Umsóknin

Umhvørvisstovan fekk hin 5. november 2009 umsókn um umhvørvisgóðkenning frá sp/f OKKARA til bryggjarívirksemi. Framleiðsla verður av øli, sodavatni og vatni, umframt tapping á fløskur og blikk.
Saman við umsóknini hevur Umhvørvisstovan móttikið frágreiðing um framleiðsluna, tekningar av innrætting og kloakkplani.
Tað móttikna tilfarið, umframt vitjan á staðnum, hevur verið grundarlag undir viðgerðini av umsóknini.

## 3 Lýsing av virkinum

Virkið er á matr. nr. 51b á Velbastað, og fer fram í bygninginum har AB-Egg var fyrr. Økið er lagt út at vera øki J, sum sambært byggisamtyktini er bóndahús. Sambært Tórshavnar kommunu er umsókn komin um at broyta byggisamtyktina til at vera vinnuøki. Broytingin var ikki endaliga komin upp á pláss tá góðkenningin varð givin.

Framleiðslan fer fram við at malt og vatn verður blandað. Stívilsið í maltinum verður gjørt um til sukur, urtir verða tilsettar og hita verður upp til 100˚C og kókað. Síðani verður kølt niður aftur, ger verður tilsett, gerar og lagrar í 1 – 6 mánaðir. Lidna ølið verður fylt á glas einnýtisfløskur á 33 cl, 50 cl og 75 cl, og á dós á 33 cl og 50 cl. Framleiðslukapasiteturin er 6000 hl/ár.

## 4 Lýsing av umhvørvisviðurskiftum

Nakað av luktútláti kann væntast frá bryggjarínum, og tí verða treytir settar um, at bryggjaríið má seta avmarkandi tiltøk í verk, um ampar verða. Nærmasti granni býr umleið 400 m burturi. Eisini kemur spillivatn frá framleiðsluni. Virkið upplýsir, at størsta spillivatnsnøgdin kemur frá bryggjhúsinum, sum inniheldur lívfrøðiligt tilfar frá maltinum. Treyt verður tí sett um at hava reinsiskipan á spillivatnsleiðingini, soleiðis at partiklar og botnfelliligt evni verður hildið aftur. Harafturat skal reinsiskipanin røkjast soleiðis, at hon altíð virkar til fulnar.

## 5 Viðgerð

Uppskot til umhvørvisgóðkenning varð send SP/F OKKARA og Tórshavnar kommunu til viðmerkingar tann 30. juni 2010.

SP/F OKKARA hevði ongar viðmerkingar til uppskotið.

Tórshavnar kommuna mælti til, at tað í góðkenningini undir treytunum um óljóð bleiv nevnt, hvat øki talan er um. Hetta hevur Umhvørvisstovan tikið til eftirtektar.
Harafturat mælti kommunan til, at rottangaviðurskifti vóru nevnd. Orsøkin til, at hesi viðurskifti ikki eru nevnd í umhvørvisgóðkenningini er, at rottangaviðurskifti eru regulerað í kunngerð nr. 53 um umhvørvisreglur frá 3. mai 1994 um umhvørvisreglur, sum broytt við kunngerð nr. 90 frá 28. september 2007, og tí verða tey ikki partur av umhvørvisgóðkenningini.

Undir viðgerðini er serligur dentur lagdur á:

- At umhvørvisdálkandi evni ikki verða leidd út í umhvørvið
- At virkið ikki elvir til luktampar
- At innaneftirlit, umhvørvisstýriskipan og skrásetingar eru sambært viðurkendum skipanum

## 6 Góðkenningartreytir

Umhvørvisgóðkenningin er givin við niðanfyri nevndu treytum:

### 6.1 Innrætting

6.1.1 Virkið skal verða innrættað og rikið, sum sagt er frá í umsókníni.

6.1.2 Allar frárenningar, útleiðingar, reinsiskipanir og goymslur skulu vera gjørdar, áðrenn virksemið byrjar.

6.1.3 Miðast skal eftir at nýta bestu tøku tøknina (BAT[1]), og skal tøka reinsiútgerðin altíð nýtast til fulnar, soleiðis at virkið kann halda øll útlát so lág sum gjørligt.

## 6.2 Goymslur

6.2.1 Goymslur av kemikalii skulu vera vardar ímóti regni og vindi, og skulu kemikalii goymast soleiðis sum datablaðið ávísir.

6.2.2 Lekar skulu kunna haldast aftur í savningarbrunni ella bakka, sum rúmar innihaldið í tí største ílatinum.

6.2.3 Goymslan skal kunna læsast fyri óviðkomandi.

## 6.3 Burturkast

6.3.1 Alt burturkast skal handfarast í samsvari við galdandi reglur um burturkast[2] og skal latast til góðkendan móttakara.

6.3.2 Burturkast skal goymast í íløtum ella bingjum, sum eru egnað til endamálið, og skal standa soleiðis, at tað ikki elvir til dálking ella er til ampa.

6.3.3 Kemikalii- og rávørurestir ella evni, sum av eini ella aðrari orsøk skulu burturbeinast, mugu ikki latast út við spillivatninum, men skulu burturbeinast í hóskandi burturkastskipanir.

6.3.4 Flótandi og fast serliga dálkandi burturkast skal goymast í íløtum, sum eru egnað til endamálið, og sum eru merkt, soleiðis at tað sæst, hvat er í.

6.3.5 Burturkast á goymslu skal standa soleiðis, at tað ikki elvir til dálking ella er til ampa, og soleiðis at møguligt spill ikki verður leitt í kloakkina.

6.3.6 Reglulig avskipan skal vera av burturkasti soleiðis, at goymslurnar ikki gerast ov stórar.

## 6.4 Spillivatn

6.4.1 Fyri at avmarka útleiðingina mest møguligt, skal møguligt spill takast upp og burturbeinast í hóskandi burturkastskipan, áðrenn undirlagið verður vaskað ella spulað.

6.4.2 Spillivatnið frá framleiðsluni skal leiðast gjøgnum hóskandi reinsiskipan soleiðis, at ásett markvirðir fyri spillivatn kunnu haldast, áðrenn tað verður leitt í kommunala kloakk.

6.4.3 Reinsiskipanin skal røkjast soleiðis at hon altíð virkar til fulnar.

6.4.4 Sýnistøkubrunnur, ið ger tað møguligt at taka sýni av reinsaða spillivatninum, skal vera eftir møguliga reinsing.

6.4.5 Einki frárenningarvatn má bera brá av olju ella aðrari dálking.

6.4.6 Alt spillivatn skal leiðast í kommunalu spillivatnsleiðingina.

---

[1] Best Available Techniques.
[2] Kunngerð nr. 147 frá 19. oktober 1995 um burturkast, broytt við kunngerð nr. 90 frá 28. september 2007.

## 6.5 Óljóð, ristingar og ljós

6.5.1 Óljóð[3] frá virkseminum má ikki fara upp um virðini í talvu 1.

6.5.2 Sambært byggisamtyktini er økið lagt út til bóndahús. Sostatt eru markvirðini fyri øki 4 galdandi. Verður byggisamtyktin broytt, broytist eisini hvørji markvirði eru galdandi.

**Talva 1: Markvirði fyri óljóð - dB(A)**

| Dagur | Tíð | Øki 1 | Øki 2 | Øki 3 | Øki 4 |
|---|---|---|---|---|---|
| Mán – frí | 07.00 - 18.00 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Ley | 07.00 - 14.00 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Mán – frí | 18.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Ley | 14.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Halgidagar | 07.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Allar dagar | 22.00 - 07.00 | 70 | 60 | 40 | 35 |

Øki 1: Vinnuøki og havnarøki, har larmandi virksemi kann fara fram.
Øki 2: Vinnuøki og havnarøki, har minni larmandi virksemi kann fara fram.
Øki 3: Blandað bústaðar- og miðstaðarøki.
Øki 4: Bústaðarøki.

6.5.3 Í tíðarskeiðinum kl. 22-07 kann óljóð (løtuvirði) í bústaðarøkjum (øki 3 og 4) í mesta lagi fara 15 dB(A) upp um omanfyrinevndu markvirði.

6.5.4 Virksemið skal ikki hava við sær ampar av óljóði, íroknað lág- ella háfrekventum óljóði, ristingum, ljósi ella geislingum. Um ampar verða av hesum, skulu neyðug tiltøk setast í verk.

## 6.6 Útleiðing til luft

6.6.1 Virksemið má ikki hava við sær ampar av royki, lukti ella dusti uttan fyri øki virkisins.

6.6.2 Allar útleiðingar til luft skulu førast uppeftir.

6.6.3 Um ampar verða av royki, lukti, dusti ella øðrum, skulu avmarkandi tiltøk setast í verk.

6.6.4 Ketilin, sum er 154 kW, skal kunna halda hesi markvirði:

6.6.5 NOx, roknað sum $NO_2$ = 110 mg/normal $m^3$ av turrum royki við 10% $O_2$

6.6.6 CO = 100 mg/normal $m^3$ av turrum royki við 10% $O_2$

6.6.7 Eina ferð árliga, fyrstu trý árini eftir at virksemið er byrjað, skulu kanningar gerast av útlátinum frá ketlinum, fyri at prógva, at markvirðini verða hildin.

## 6.7 Sýnistøkur

6.7.1 Tá virksemið er byrjað, skal spillivatnskanning gerast fýra ferðir árliga og kannast skal sambært talvu 2. Aftaná tvey ár verður, við støði í kanningarúrslitum, støða tikin til, um kanningartíttleikin kann setast niður.

[3] Ásett sum tað ekvivalenta, korrigeraða óljóðsstøðið í dB(A) í viðkomandi økjum sambært kommunalu byggisamtyktini.

6.7.2 Spillivatnssýni skulu takast úr sýnistøkubrunni eftir møguliga reinsing.

**Talva 2: Markvirðið fyri spillivatn**

| Parametur | Markvirði |
|---|---|
| Botnfelt evni | 10 ml/l |
| Suspenderað evni | 300 mg/l |
| Olja / feitt | 50 mg/l |
| pH | 6,0 – 9 |

## 6.8 Rakstarskráseting/umhvørvisfrágreiðing

6.8.1 Virkið skal skráseta hesar upplýsingar:

- Rávørunøgdir, herundir allar vørur til framleiðslu og reingerð
- Framleiðslunøgdir
- Burturkast frá framleiðsluni og móttakari
- Tøming av spillivatnsreinsiskipan, dato og móttakari
- Kanningarúrslit av spillivatnskanningum
- Orkunýtsla
- Rakstrartrupulleikar/óhapp
- Onnur viðurskifti av umhvørvisligum týdningi

6.8.2 Rakstrarskrásetingarnar skulu til eina og hvørja tíð kunna síggjast av eftirlitsmyndugleikanum og skulu goymast í 5 ár.

6.8.3 Fyrstu trý árini eftir at virksemið er farið í gongd, skal árlig umhvørvisfrágreiðing við uppgerð av rakstrarskrásetingum og frágreiðing um umhvørvisviðurskifti, tulking av kanningarúrslitum, óhapp, gjørd og ætlað umhvørvistiltøk v.m. sendast Umhvørvisstovuni í seinasta lagi 1. mai í avloysandi árinum. Eftir hetta, skal árlig umhvørvisfrágreiðing sendast Umhvørvisstovuni eftir áheitan.

## 6.9 Innaneftirlit / Umhvørvisstýrisskipan

6.9.1 Sp/f OKKARA skal hava eina ætlan fyri at skifta umhvørvisskaðilig evni, sum virkið nýtir, út við evni við betri umhvørvisligum eginleikum.

6.9.2 Kanningar, sum eru ásettar í hesi góðkenning, kunnu broytast, herundir víðkast til onnur sýnissløg og fleiri parametrar, eftir nærri áseting frá Umhvørvisstovuni.

6.9.3 Allar sýnistøkur og kanningar skulu gerast av starvsstovu, sum kann góðkennast av Umhvørvisstovuni.

6.9.4 Allar sýnistøkur, kanningar og metingar av úrslitum verða goldnar av SP/F OKKARA.

6.9.5 Umhvørvisstovan kann krevja, at virkið skjalprógvar, at treytirnar um óljóð, ristingar og ljós, um útleiðing til luft og um spillivatn, verða hildnar.

6.9.6 Umhvørvisstovan kann krevja, at virkið ger serligar kanningar fyri at meta um møgulig dálkingarárin frá virkinum.

### 6.10 Óhapp

6.10.1 Har vandi er fyri spilli av evnafrøðiligum evnum, skal arbeiðast á skynsaman hátt, so at dálking ikki stendst av hesum.

6.10.2 Virkið skal hava mannagongdir til fyribyrging av dálkingaróhappum og til upprudding eftir møgulig óhapp.

6.10.3 Virkið skal hava útgerð til upprudding eftir møgulig dálkingaróhapp.

6.10.4 Henda dálkingaróhapp, skulu beinanvegin setast í verk tiltøk til avmarking og upprudding.

6.10.5 Størri útlát ella dálking skal beinanvegin fráboðast Umhvørvisstovuni. Eisini skal ein frágreiðing um orsøk og møgulig tiltøk til upprudding v.m. sendast Umhvørvisstovuni[4].

### 6.11 Almennar treytir

6.11.1 Boðast skal Umhvørvisstovuni frá, tá ið farið verður undir virksemið.

6.11.2 Er virksemið ikki byrjað innan eitt ár frá tí at umhvørvisgóðkenningin er lýst, fellur umhvørvisgóðkenningin burtur.

6.11.3 Virkið má ikki víðkast ella broytast byggifrøðiliga ella rakstrarliga á ein hátt, ið økir dálkingina, uttan nýggj góðkenning er givin.

6.11.4 Henda umhvørvisgóðkenning, við møguligum broytingum og dagføringum, skal altíð vera tøk á virkinum og skulu øll viðkomandi starvsfólk kenna innihaldið og vera kunnað um ta lóggávu, sum góðkenningin er grundað á. Virkið skal altíð tryggja sær, at treytirnar í hesi góðkenning verða hildnar, um neyðugt við at gera egnar mátingar og skrásetingar.

6.11.5 Eigaraskifti, navnabroyting ella avtøka skal fráboðast Umhvørvisstovuni. Um virksemið heldur uppat, skal alt tilfar og øll útgerð beinast burtur.

6.11.6 Umhvørvisstovan hevur eftirlitið við virkinum. Eftirlitið verður útint sambært kap. 7 í umhvørvisverndarlógini.

6.11.7 Í 5 ár eftir at góðkenningin er givin, kunnu nýggjar treytir bert ásetast, um so er, at:

- nýggjar upplýsingar eru komnar fram um dálkingarárin
- dálkingin elvir til umhvørvislig árin, ið ikki vóru kend, tá ið góðkenningin varð givin
- dálkingin í aðrar mátar verður størri enn hon, ið góðkenningin er givin eftir

6.11.8 Aftaná fimm ár kann Umhvørvisstovan broyta treytirnar í hesi góðkenning, tá ið tað er umhvørvisliga grundað.

6.11.9 Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um tað er neyðugt við øðrum góðkenningum.

## 7 Kæruvegleiðing

Henda avgerð kann, sambært § 66 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd, sum broytt við løgtingslóg nr. 128 frá 22. desember 2008, kærast til

[4] Dálkingaróhapp skulu eisini fráboðast til Løgregluna (dálking á landi) ella til Sjóbjargingarstøðina, MRCC-Tórshavn (dálking á sjónum).

landsstýrismannin við umhvørvismálum. Kæran skal sendast Umhvørvisstovuni, sum síðan sendir hana til Innlendismálaráðið við neyðugum skjølum.
Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.

Jóhanna Olsen, deildarleiðari

/

Eyð Eidesgaard, umhvørvisviðgeri

**Avrit:** Tórshavnar Kommuna, Postrúm 32, FO-110 Vaglið
Landslæknin, Postrúm 9, FO-110 Tórshavn.